Vestmanna 16-03-2023

Til FVR

v/Fiskimálaráðið

Yvir við Strond 15

# ***<u>Frágreiðing</u>***

*<u>Um atburðin hjá flatfiski ímun til tosk (mál 18/00666)</u>*

Sp/f Skálafossur søkti dagf. 29/11-2018 um 100.000kr til verkætlan, sum ætlandi skuldi staðfesta munin á atburðinum hjá flatfiski ímun til tosk. Higartil eru 50% av upphæddini útgoldnar av FVR/FVG.

Eins og bagrundin (nærri heildarlýsing í umsøkn punkt 8) fyri umsøkn okkara vísur á, mettu vit tað vera áhugavert/týdningarmikið at savna inn sjónbandaupptøkur fyri at kunna skilja munin á atburðinum hjá flatfiski, ímun til tosk. Fokuspunkti var at kunna staðfesta ein eventuellan mun á atburðinum aftur í móti ristini í trolinum, eftirsum hendan er eitt krav til troling á landleiðini um summari. Ein møgulig staðfesting á muninum á atburðinum, vil kunna vera partur av arbeiðinum framyvir at betra/dagført ristina, so hon kann koma at skilja flatfisk og tosk í betri mun frá hvørjum øðrum meðan fiska verður.

Í mong ár høvdu vit illgruna um (áðrenn umsøkn okkara), at kravda innsetta ristin í troli ikki skilur nóg væl. Sjónbandaupptøkurnar rundanum ristina í tíðarskeiðnum 19-22 mai 2019 staðfesta lutvíst hendan illgruna. Sjónbanda-upptøkur eru sendar til Havstovuna og Vónina (punkt 15 í umsøkn).

Skriv og niðurstøður frá Vónini og Havstovuni eru viðheft niðanfyri.

## ***<u>Rokniskapur ímun til fiskivinnuroyndina</u>***

| | |
|---|---|
| Avreiðing nettosøla (sí viðheft) | +130.000kr |
| FVR | + 50.000kr (50% er flutt av játtaðari upphædd á 100.000kr) |
| Fakt útgerð | - 75.000kr (hylkir, kamera, lyktir) |
| Rakstur skip | - 80.000kr (lønir, olja og aðrir omk.) |
| <u>Útgerð Vónin</u> | <u>- 35.000kr (rist + maður vónin)</u> |
| <u>Rokniskaparligt úrslit</u> | <u>- 10.000kr</u> |

## ***<u>Niðurstøða/eygleiðingar frá Skálafossur VN559:</u>***

Tað blivu gjørd 12 tov á 1-3 tímar á túrinum. Royndin bleiv gjørd á einum øki eystanfyri, kassa B og A2. innanfyri 12fj.

Tað er tíðuligt á øllum tovum/upptøkum at flatfiskur ikki ber seg at á sama hátt sum toskur, tá hann kemur aftur ímóti ristini. Út frá upptøkunum upplivir toskurin ristina sum eina hóttan og vil royna at umganga at bera við ristina, so leingi hann hevur orku til hetta. Hann roynir at svimja fram frá ristini og tá hann er út lúgvaður, verður hann førdur aftur til rimanar (40mm ímillum), og síðan í posan aftanfyri ristina (120mm ins) ella uppum ristina og endar harvið í ovara posanum (180mm ins). Tekning er í PP-framløguni.

Haraftur ímóti upplivir flatfiskurin (tunga, havtaska, skøta og reyðsprøka) ikki ristina eins hóttandi og toskurin ger. Flatfiskurin, f.eks. ein stór havtaska, kann leggur seg gjarna fyri stóran part av ristini og forar harvið møguleikanum fyri at f.eks. tunga kann sleppa aftur í posan aftanfyri ristina. Eisini sæst at størru reyðsprøkurnar ikki sleppa ímillum rimanar (40mm), tí tær eru ov stórar/feitar.

Upptøkur frammi í bellinum vísa at flatfiskurin kemur aftur í gjøgnum bellin heldur niðari enn toskurin.

Logbók er viðheft í Excel-formati. 100 prøvar av hvørjum fiskaslagi (tosk-reyðsp.-tunga) eru tiknar. Júst hesi fiskasløgini geva eina ábending um hvat støddarmunurin er á nevndu fiskasløgum í ovara og niðara posanum. Sum PP-framløgan vísur á við grafum o.ø., er støddin á øllum fiskasløgum væl omanfyri gýtingar-aldur/stødd, við bert nøkrum heilt fáum undantøkum. Hetta ger at rúm burdi veri fyri betringum/broytingum, uttan at man gjørdi seg inná nakran gýtandi part av hesum fiskasløgum.

Føroyingar fiska væl størri flatfisk ímun til fleiri lond rundan um okkum. Eitt nú fiska vit mestsum bara stóra reyðsprøku. Hendan gevur nógv verri prís enn eitt nú tann smærra reyðsprøkan. Sama er galdandi ímun til tungu, men her er prísurin tó kortini ílagi, hóast hon er forholdsvís stór.

***<u>Niðurstøða/eygleiðingar frá Vónini:</u>***

# Flatfiska rist

**Fra:** Børge Christiansen
**Sendt:** mánadagur, 19. apríl 2021 08:35
**Til:** Jógvan P Olsen <jpo@vonin.com>
**Cc:** Jógvan P Olsen <jpo@vonin.com>
**Emne:** Flatfiska rist

Hey Bjarni.

Nú hava vit siti og hugt eftir filminum, í tit hava filma av flatfiska ristini, har er nokk onki at ivast í at broytingar til tað betra kunna gerast.
Eitt kundi veri at skift ristina út við eina stívari plast rist, tað hevði uttan iva veri ein góð byrjan, eisini av standurin millum rimarnar er nokk eisini eitt man kundi hugt uppá, sær út sum fiskurin í skal fara ígjøgnum ristina sleppur leggur seg flatan á ristina og, heldur tippir enn at fara aftur í posan. Eisini hevði veri gott um man slapp undan at brúka kúlur á ristuni.

Sum sagt  so eru hetta nakrar niðurstøður vit komu til, við at sita og hyggja eftir filminum, og gera okkara meting.

Kind Regards

VÓNIN®
**Børge Christiansen**
Trawl Technician
E-mail: bc@vonin.com
Tel.: +298 230 224
**www.vonin.com**

# ***Niðurstøða/eygleiðingar frá Havstovuni:***

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

Tórshavn, 16. mars 2023

**Greining av filmsupptøkum av troli, ið verður nýtt í fiskiskapi á landleiðini eftir flatfiski, har trolútgerðin hevur tveir posar sundurskildir við innsettari rist við 40 mm millum rimarnar.**

Endamálið við filmsuppøkunum var at kannað atburðin hjá flatfiski í mun til tosk á landleiðini. Havstovan greinaði upptøkurnar við denti á at kanna úrtøkuna, og hvussu væl ristin riggaði.

Skálafossur gjørdi ellivu tóv við filmsupptøkum 20. – 22. mai 2020 í økinum A2 og B, har sjey tóv vóru fingin til høldar við filmsupptøkur framman fyri ristina. Tóvini vardu millum 2½ - 4 tímar, meðan upptøkurnar vardu áleið 1½ tíma eftir, at trolið var komið á botn. Sýnisøkið (field of view – FOV) í filmsupptøkunum var ovara helvtin av ristini og upp í samanrenningina av ovara trolposa, burtursæð frá eini upptøku, sum vísti alla ristina.

Við eini roynd at kvantifisera effektivitetin hjá ristini varð kannað, um ≥30% av ristini bleiv blokerað av fiski (t.e. reyðsprøku, tungu, havtasku ella toskafiski (*Gadidae spp.*)) í meira enn 30 min av filmsupptøkuni. Í seks av sjey upptøkum/tóvum sást at ≥30% av ristin var blokera av fiski í 30 minuttir ella meira ta fyrru hálvuna av tóvinum. Harav blokeraði reyðsprøka trý og havtaska tvey av teimum seks tóvunum.

***Tað ber tó ikki til at siga útfrá hesum kanningum, hvussu stóran mun blokada ávirkar úrtøkuna.***

Uppskot er tí at gera fleiri slíkar kanningar við m.a. hesum tillagingum:

1) Trolútgerðin hevði ein ovara posa, ið hevði 200 mm meskavídd, og ein niðara posa, ið hevði 120 mm meskavídd. Til víðari kanningar er tó neyðugt at báðir trolposarnir hava somu meskavídd (t.e. 120mm meskavídd), so úrtøkan í báðum posunum er sambærlig, og tal, nøgd og longd av fiski kann kvantifiserast.
2) Filmsupptøkurnar vístu, hóast sýnisøkið ikki var fullkomið, at í flestu førum bleiv ristin í ein ávísan mun blokera av fiski, t.e. reyðsprøku, havtasku og eisini toskafiski. Til víðari kanningar er tó neyðugt, at sýnsøkið (FOV) av ristini er fullkomið (t.v.s. øll ristin sæst), soleiðis at virkisføri av ristini kann kvantifiserast.
3) Neyðugt er eisini at tóvtíð og filmsupptøkutíð eru eins langar, soleiðis at staðfestast um virkisføri hjá ristini broytist ígjøgnum tóvi.
4) Fleiri tóv – helst uml. 15 tóv.

Vegna Havstovuna,

Hannipoula Olsen
Fiskifrøðingur

P.O.Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo

## ***Niðurstøða/útgangur***

Vónandi kann hendan verkætlanin nýtast sum avsett í eini víðarimenning av ristini.

Tað eru longu nú tankar/hugsanir um hvussu hendan skiljiskipanin kann víðarimennast. Tá tíðin er búgvin og man hevur eitt uppskot til dagføringar, er ætlanin at søkja FVG/FVR um stuðul.

Havstovan og Sp/f Skálafossur hava hvør sítt eintak av sjónbandupptøkunum í varveitslu. Til hesa frágreiðing tilhoyra logbók og framløga, sum eru send FVG saman við hesi frágreiðing.

Sp/f Skálafossur takkar FVG/FVR fyri stuðulin.

Bjarni í Skál

*Bjarni í Skálum*